# Føroysk Myndlistafólk

# Ársfrágreiðing 2016

Leygardagin 22. oktober 2016 hevði felagið Føroysk Myndlistafólk aðalfund. Á skránni var nevndarval, har Sigrun Gunnarsdóttir stóð fyri vali. Fyri Sigrun er Jón Sonni Jensen valdur í nevndina. Nevndin hevur skipað seg við Jóhan Martini Christiansen sum formanni, Finleif Mortensen er vorðin kassameistara og Jón Sonni Jensen er nýggjur skrivari.

Somuleiðis var val av limi í stýrið fyri Listasavn Føroya, har Ingi Joensen varð afturvaldur, og Jóna Rasmussen varð vald sum tiltakslimur.

Úrvalsnevndin fyri Várframsýningina 2016 heldur fram komandi ár, hesi eru Jóhan Martin Christiansen, Jón Sonni Jensen og Randi Samsonsen.

Felagið hevur sum aðalmál, at betra um viðurskiftini hjá føroyskum listafólkum, og hesum hevur nevndin roynt at stremba eftir seinasta árið. Nakað av tí, sum felagið hevur arbeitt við seinasta árið er:

Árið byrjaði við einum kunnandi kaffifundi við systirfelag okkara í Danmark, Billedkunstnernes Forbund, har Nis Rømer gjørdis formaður í januar. Vit sum felag ynskja at knýta sambond við norðurlendsku feløgini, har vit í felag kunnu náa nøkur mál, men enn kunnu vit staðfesta, at í Føroyum eru vit eftirbátar á nógvum økjum, m.a. innan avtalur við tað almenna um samsýningar, almennar listprýðisuppgávur og skipanir annars.

Føroysk Myndlistafólk ynskir eisini at styrkja sambondini við feløg og stovnar í Føroyum, og hevði í februar fund við Listasavn Føroya og Listafelag Føroya um hvørji mál, ið vit í felag kunnu arbeiða við. Nevnt varð m.a. at fáa atelierfelagsskapir, sum stórur tørvur er á.

Í februar hevði Listafólkasamband Føroya aðalfund, har ið Føroysk Myndlistafólk legði fram eina áheitan fyri starvsnevndina og umboðsráðið, um at fara at hyggja eftir bygnaðinum í Mentanargrunni Landsins, har tað týðuliga sæðst aftur at tónleikur og bøkur fáa játtað mest stuðul. LISA arbeiðir áhaldandi við at fáa skipað Listagrunn Føroya, har dentur verður lagdur á fakligheit, ið kemur frá listafólkunum sjálvum, og at allar listagreinar verða umboðaðar á allan hátt.

LISA hevur gjørt eina eftirmeting av Loftbrúnni, har limir í feløgunum vórðu bjóðaðir at svara, hvat teir halda um skipanina. Okkara felag hevur sum heild eitt ynski um, at skipanin verður víðkað soleiðis at lættari verður at flyta størri verk, t.d. at skipaflutningur verður við. Somuleiðis eru ynski um, at tað skal bera til eisini at ferðast til Føroyar, og ikki einans úr Føroyum, við verkætlanum. Eisini eru ynski um at íblástrarferðir kunnu gerðast.

Seinasta árið eru tvær stórar almennar listprýðisuppgávur settar í gongd í samband við almennar byggjiverkætlanir, tað eru Glasir og H-bygningurin. Føroysk Myndlistafólk hevur ynski um og arbeiðir við, at hetta verður fastur táttur, tá ið tað almenna fer undir byggjiverkætlanir, størri umvælingar, o.s.fr..

Í hesum sambandinum, hevur felagið skrivað ein avtalu frymil, sum limir og onnur kunnu brúka. Felstu viðurskiftini eru umrødd, men leggjast kann afturat ella skerjast burtur. Frymilin kan eisini brúkast í samband við framsýningar og líknandi. Sí frymilin, ið er viðfestur.

Felagið hevur sett seg í samband við Tórshavnar Kommunu, ið hevur sett sær fyri at legga fíggjing til síðis til list í nýggjum verkætlanum. Peningur verður settur av til list til nýggja skúlan á Fløtum, og skjótt verður hetta arbeiðið skipað. Tó hevur Tórshavnar Kommuna ikki ætlanir um, at seta pengar av til list í samband við komandi havnaútbyggjingina ella stóru umvælingina av ítróttarhøllina á Hálsi.

Eitt av endamál við felagnum er at skapa sambond millum limirnar. Vit ynskja at limirnir hitta hvønn annan, og tí eru vit farin undir at skipa fyri vitjanum í verkstøðum hjá hvørjum øðrum. Í ár varð vitjað í Listamannahúsinum á Dalatrøðni, har Jóhan Martin Christiansen arbeiddi. Komandi ár gleða vit okkum til at síggja fleiri verkstøð og hava spennandi samrøðum um list.

Við ynskjum um eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár

Nevndin

**Jóhan Martin Christiansen**, formaður

**Jón Sonni Jensen**, skrivari

**Finleif Mortensen**, kassameistari